# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

*»Samanlagt hevur eingin gjørt tað betri enn Ferguson«*

*Arsene Wenger, Arsenal-venjari, um starvsfelagan í Manchester United*



# Øll í felagnum hjálpa til

**Teir 98 fimleikararnir hjá Støkk skiftu búna hópatals ferðir lítla korterið, sum teirra framsýning vardi. Íalt vórðu 40 ymiskir búnar nýttir, og gevur hetta eina góða mynd av tí arbeiði, sum liggur handan framførslurnar á Fimleikafagnaðinum**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Úti við 40 ymisk snið av búnum skuldu seymast, áðrenn tey í Støkk vóru til reiðar at hava sína framførslu á Fimleikafagnaðinum. Flestu av búnunum skuldu eisini gerast í nógvum eintøkum, so alt í alt hevur talan verið um hundraðtals búnar, sum skuldu seymast.

– Búnarnir eru jú ein stórur partur av framsýningini, so tað er heilt víst nakað, sum vit leggja stóran dent á. Og tað er eitt veldugt arbeiði, sum er gjørt fyri hetta. Nevnd, mammur og onnur, sum onkursvegna eru knýtt at felagnum hava framt eitt ótrúliga stórt arbeiði, sum vit øll eru serstakliga fegin um, sigur Dagbjørt Sólheim, sum er ein av teimum, sum var við til at samskipa framførsluna hjá Støkk á Fimleikafagnaðinum. Ein fagnaður, sum Støkk vann fyri fimtu ferð, soleiðis at tær nú hava vunnið ferðasteypið, sum kappast verður um, til ognar.

### Drúgv fyrireiking

Hóast fimleikafagnaðurin ikki er kappingarfimleikur á sama hátt sum eitt nú FM-kappingin er tað, so dylur Dagbjørt ikki fyri, at sera nógv verður lagt fyri.

– Hetta er ein sera týðandi partur av tí, sum Støkk arbeiðir við. Ikki minst tí Fimleikafagnaðurin er eitt tiltak, har øll breiddin í felagnum kemur til sín rætt. Sjálvt evnið, sum arbeitt verður við, fáa vit at vita okkurt um hálvt ár fyri framsýningina, og so verður arbeitt miðvíst við at leggja alt so væl til rættis, sum tað yvir høvur ber til, sigur hon.

### Betri sammeting

Sum tað framgongur aðrastaðni her á síðunum, so bar valið av evni hesa ferð við sær, at fleiri av framførslunum gjørdust sera líkar. Men hóast hetta minkaði um variatiónina í framførsluni, so heldur Dagbjørt ikki, at hetta bara var keðiligt.

– Á ein hátt haldi eg, at hetta ger kappingina meira spennandi, tí tað gevur eitt nógv betri sammetingargrundarlag, tá metast skal um avrikini.

– Men hinvegin skilji eg eisini væl, at tað ger alla framførsluna meira einstáttaða. Tá evnið er somikið ítøkiligt, so snúgva nógvar framførslur seg um somu evni og somu eyðkenni, og tað er kanska eitt sindur spell.

### Steypið í føðingardagsgávu

Orðið fagnaður og tað at nýta breiddina hava kanska hug at minka eitt sindur um kappingarelementið í fagnaðinum, um sammett verður við aðrar kappingar. Men tá eitt steyp er at vinna, so vilja øll sjálvandi gera sítt ítarsta, og Dagbjørt dylur ikki fyri, at tað er stuttligt hjá felagnum at tey nú eiga steypið til ognar.

– Sjálvt steypið hevur ikki alt at siga. Men tað er klárt, hetta økir um spenningin fyri luttøkuni. Og nú felagið fyllir 40 ár um tríggjar vikur, so er hetta kanska eyka stuttligt í so máta. Ikki minst, tí fimleikafagnaðurin sum tiltak er við til at styrkja samanhaldið og felagsandan í felagnum.

### Støkk-venjararnir

Bodil Tausen
Joan Simonsen
Dagbjørt Sólheim
Rannvá Troest
Drita Knudsen
Anita Knudsen
Jenny Troest Davidsen
Jóhanna Petersen
Jóhanna Troest
Rósa Heinesen
Henny Joensen
Elna Johannesen
Marjun Thomassen
Hansa Hansen
Kirstin Hansen
Katrin Fredriksberg
Ann Mari R. Johannesen
Jónvá Joensen